# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabbamein í spísirøri og magasekkinum

## Sjúkueyðkenni við krabba í spísirøri ella magasekkinum

Eitt ella fleiri av niðanfyristandandi sjúkuteknum ella kliniskum funnum eiga at viðføra eina upptøku av fokuseraðari sjúkrasøgu.

- Svølgtrupuleikar (dysfagi) og/ella svølgpína > 2 vikur
- Áhaldandi spýggjan uttan aðra upplagda orsøk
- Illgrunasom refluks-sjúkutekin hjá fólki > 45 ár
- GI-bløðing ella anæmi uttan aðra greiða orsøk

Listin omanfyri er vegleiðandi og ikki fullfíggjaður. Nakrir sjúklingar hava bert, ella aftrat omanfyristandandi, almenn sjúkutekin so sum magapínu, ótilætlað vekttap, niðursettan matarhug, vaml og møði.

Blóðroyndir at kanna fyri anæmi kunnu vera viðkomandi, men skulu ikki seinka ávísing fyri illgruna um krabbamein. Trupulleiki at svølgja kann stava frá svølginum (ovarligt dysfagi) ella spísirørinum (niðarligt dysfagi). Ein nágreinilig sjúkrasøga hesum víðvíkjandi kann gera eitt sindur meira greitt, hvaðani sjúkuteknini stava. Oftast verður niðarligt dysfagi merkt sum trupulleiki at svølgja mat ella sum pína, tá matur verður svølgdur. Ovarligt dysfagi kennist heldur sum, at svølgt verður rangt.

Um illgruni er um niðarligt dysfagi eigur sjúklingurin at verða ávístur við illgruna um krabbamein í spísirøri ella magasekki

Um illgruni er um ovarligt dysfagi, eigur sjúklingurin fyrst at verða kannaður í ONH- ella neurologi høpi. Um eingin greið orsøk finst fyri ovarligt dysfagi, eigur sjúklingurin at verða endurmettur við atliti til møguliga ávísing fyri illgruna um krabbamein í spísirørinum ella magasekkinum.

Reflukssjúkutekin er vanligur trupulleiki hjá fólki at venda sær til kommunulækna. Fá av hesum hava tekin til krabbamein í spísirørinum og magasekkinum. At stuðla hesi meting, sí vegleiðing frá DSAM: “Dyspepsi og gastroøsofageal reflukssygdom hos voksne.”

## Nær skal ávísast við illgruna um krabbamein í spísirøri ella magasekki

Um eitt av niðanfyri nevndu er tilstaðar skal ávísast til útgreining fyri krabba í spísirøri ella magasekki

- Sjúkutekin nevnd omanfyri, ið vekja illgruna til krabbamein í spísirøri ella magasekki
- Malignitetssuspekt tekin á myndamodalitetum ella gastroskopi gjørd orsakað av aðrari indikatión
- Illgruni til ella staðfest residiv av fyrrverandi kurativt intenderaðum viðgjørdum krabbameini í spísirøri ella magasekki

## Handfaring av residiv ella progressión

Í uppfylgingartíðarskeiðnum: Um sjúkueyðkenni til residiv ella progressión vísa seg skal ávísast til deildina við ábyrgdini av sjúkugongdini hjá sjúklinginum.
Eftir uppfylgingartíðarskeiðið: Við illgruna til residiv verður ávíst av nýggjum við illgruna um krabbamein í spísirøri ella magasekkinum.

**Ávísingin**

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabbamein í spísirøri ella magasekki" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026